Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

upp á

§ 52a-fyrispurning nr. 31/2019 frá Johan Dahl, løgtingsmanni, viðvíkjandi Kappingareftirlitinum og kappingarstøðuna í fiskivinnuni

Spurningurin var soljóðandi:
1. Fevna kappingarlógin, kunngerðir og arbeiðsøkið hjá Kappingareftirlitinum um vinnuliga virksemið í fiskivinnuni? Her verður hugsað um at gera kanningar og metingar um kappingarstøðuna í veiðiliðnum.
2. Um ja, hví verða ongar kanningar gjørdar av kappingarstøðuni í fiskivinnuni og eru ætlanir um at gera nakrar kanningar?
3. Um nei, ætlar landsstýrismaður at leggja uppskot fyri Løgtingið, sum tryggjar, at lógin og fyrisitingarreglur eisini fevna um fiskivinnuna?

Svar:
Svarað verður undir einum:
Kappingarlógin fevnir í útgangsstøði um øll sløg av vinnuvirksemi og almennum stuðli til vinnuvirksemi. Er ein kappingaravlaging ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering, eru ásetingarnar í 2. og 3. kapitli í kappingarlógini um kappingaravlagandi avtalur og misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðu kortini ikki galdandi, sbrt. § 2, stk. 2. Í tílíkum førum kann kappingar-myndugleikin mæla til at gera broytingar í viðkomandi lóggávu.

Sambært § 24a í kappingarlógini kann Kappingareftirlitið gera kanningar av vinnugreinum við tí endamáli at fáa kunnleika til ella innlit í kappingarstøðuna. Kappingareftirlitið hevur tí heimild til at gera kanningar av veiðiliðnum í fiskivinnuni.

Tá ið Kappingareftirlitið ger kanningar av vinnugreinum, er endamálið at fáa staðfest ella avvíst, um inntriv eru neyðug til tess at stimbra kappingina.

Í fiskivinnulóggávuni eru anti-trust ásetingar, sum ein annar myndugleiki enn Kappingareftirlitið hevur eftirlit við. Somuleiðis hevur lóggevarin politiskt valt at seta ávísar kappingaravmarkingar í fiskivinnulóggávuna, sum eru grundaðar á onnur samfelagslig fyrilit. Av hesum orsøkum hevur kappingarmyndugleikin ikki raðfest kanningar av føroysku fiskivinnuni. Kappingareftirlitið hevur tó í sambandi við hoyringina av løgtingslóg um sjófeingi víst á ymisk viðurskifti, sum Kappingar-eftirlitið metti kundu verða skipað á annan hátt.

Vísandi til tað, ið er nevnt omanfyri, og vísandi til, at fiskivinnan er skipað við serligari lóggávu, sum eisini leggur upp fyri kappingarfyrilitinum, verður ikki mett neyðugt at broyta kappingarlógina.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 13. desember 2019

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður